**ARBEIÐSMARKNAÐUR** · Leif Láadal

# Fyritøkur gjalda milliónir fyri óbrúkta arbeiðsmegi

Í ein og hvørjari fyritøku – eisini í Føroyum - verður løn goldin fyri arbeiði, sum antin ikki verður gjørt, ella ikki gjørt nóg væl. Talan er um milliónir av krónum árliga, sum kundu verði brúktar nógv virknari. Tað, sum krevst, er, at ein partur av stóra miðal-bólkinum av starvsfólkum verður fluttur longur upp á stiganum, eins og tey í lægra endanum verða flutt fram í miðal- ella toppbólkin. Tað sigur Dorthe Gyldenkærne, sum er HR-mennari, og umboð fyri altjóða fyritøkuna Profiles International í Føroyum.



MYND: Leif Láadal

-Tað finst óbrúkt arbeiðsmegi fyri milliónir av krónum innanhýsis í so at siga øllum føroyskum fyritøkum, sigur Dorthe Gyldenkærne, sum við HR-amboðum kann hjálpa fyritøkum at fáa størri gagn burturúr starvsfólkunum og samstundis betri trivna.

Tað ljóðar næstan sum ein ynskidreymur hjá einum og hvørjum virkisleiðara ella stjóra. Við lutfalsliga einføldum amboðum, ber til at fáa nógv meira burturúr verandi arbeiðsmegi, uttan at starvsfólkini fara at kenna seg strongd ella misnýtt. Ja, í veruleikanum fara starvsfólkini at trívast betri enn tey gera nú, og samstundis arbeiða meira málrættað og úrslitabetri.

Men hvat skal til, og hví skipa ikki allir virkisleiðarar sítt arbeiði eftir hesum leist-i, um tað sæst so týðiliga aftur á botnlinjuni?

Dorthe Gyldenkærne, sum hevur fyritøkuna Ad Astra (www.adastra.fo) er føroyskt umboð fyri altjóða fyritøkuna Profiles International, sum hevur deildir ella umboð í 117 londum, sigur, at nógvir virkisleiðarar og stjórar eru við at fáa eyguni upp fyri teimum leiðsluamboðum, sum framkomin Human Resource starvsfólkamenning leggur upp til.

-Sjálvt um hetta er eitt øki, sum enn ikki er so útbreitt her heima, so síggja vit, at áhugin er her, og við teimum royndum, og serliga teimum úrslitum, sum hesi amboð kunnu vísa á um allan heim, er tað heldur ikki so løgið, at eisini føroyskir virkisleiðarar vilja menna og gera fyritøkur sínar virknari við HR-amboðum, sigur Dorthe Gyldenkærne.

### 10.FALDAÐU UMSETNINGIN

Tað finnast nógvar sólskinssøgur í arkivinum hjá Profiles International, sigur Dothe Gyldenkærne. Og fyritøkurnar eru heldur ikki bangnar fyri at vísa øðrum, at HR-menningin og tey amboð, sum tær hava lært, hava hjálpt. Millum annað ber til at lesa inni á heimasíðuni profilesinternational.dk um fyritøkuna Ciba Vision, hvørs seljarar megnaðu at veksa mánaðarliga umsetningin frá góðum 400.000 krónum upp í góðar fimm milliónir krónur eftir einum hálvum ári, eftir at hava verið gjøgnum HR-mylnun-a hjá Profiles. Og Dorthe Gyldenkærne ivast ikki í, at tað finnast føroyskar fyritøkur, sum kunnu uppliva ein líknandi vøkstur, um tær lata seg kanna, og síðani skipa arbeiðsmegina og arbeiðsháttin eftir teimum frymlum, sum finnast á HR-marknaðinum.

-Vit kunnu so vísa til okkara máta at skipa arbeiðið, og serliga í hesum døgum, har tað er sera torført at fáa fólk at søkja leys størv, er tað av størsta týdningi, at tey, sum eru í fyritøkuni, avrika so nógv sum tey kunnu, sigur hon.

### STÓRI MIÐALFLOKKURIN

Profiles International hevur nógv ár á baki, og alt tað tilfar, sum fyritøkan liggur inni við, verður mill-um annað brúkt til at gera hagtøl av ymsum slagi. Eitt yvirlit vísir, at so at siga allar fyritøkur við einum ávísum tali av starvsfólk-um hava 16 prosent "non producers" – tað eru fólk, sum ikki fáa nakað serligt burturúr sínum arbeiði – 68 prosent "miðal starvsfólk" og 16 prosent "top performers" – fólk, sum fáa nógv burturúr sínum arbeiði. Uppgávan hjá fyritøkuni er tí at fáa flutt mørkini fyri hesar bólkar. Fáa flutt tey í niðasta bólki uppeftir – antin í miðal bólkin ella heilt upp á tindin - og tey í miðalbólkinum upp í ovast-a bólk. Og tað krevur ikki so nógv, sum ein kanska skuldi hildið, sigur Dorthe Gyldenkærne.

-Í stuttum arbeiða vit á tann hátt, at tað snýr seg um at finna útav, hvat viðkomandi starvsfólk egnar seg best til. Tað finna vit útav við at lata tey kanna, fortelur Dorthe Gyldenkærne.

Hesar kanningar, ella "tests" verða fyri fyrst framdar við spurnarbløðum. Svarini verða síðani viðgjørd, og út frá teimum verða fólk sett í bás. Við samrøðum kann so staðfestast, um úrslitið av kanningini samsvarar. Sum oftast eru skrivligu spurnakanningarnar nóg mikið.

Við at finna eini trý starvsfólk, sum eru tey bestu á sínum øki, kunnu úrslitini av kanningunum sammetast við profilarnar hjá hesum trimum "top performers". Fyri at fáa fleiri góð og arbeiðssom starvsfólk á hvørjum øki, eiga fólk tí at verða flutt í tann arbeiðsbólk, sum svarar best til persónliga profilin.

-Og tá uppliva vit ofta, at fólk, sum vóru dømd at vera "non producers" kunnu flytast heilt upp í "top performers", tí nú hava tey eitt starv, har tey trívast og hava áhuga fyri at vera, sigur Dorthe Gyldenkærne.

**ARBEIÐSMARKNAÐUR** · Leif Láadal

# Uppsøgn ikki altíð rætta loysnin

Tað er ofta so, at eitt starvsfólk, sum ikki klárar sína uppgávu, endar við at siga upp ella verður uppsagt. Men hetta er ikki altíð rætta loysnin, sigur HR-mennarin Dorthe Gyldenkærne.

Størru arbeiðsplássini hava sjálvsagt betri umstøður enn tær smærru, men tað ber eisini til at umskipa arbeiðsuppgávur í einari miðalstórari ella enntá lítlari fyritøku. Og á tann hátt slepst møguliga undan at seta eina starvslýsing í bløðini – eina lýsing, sum kanska ikki so nógv fólk reagera upp á í hesum døgum, har arbeiðsmegi er høgt í metum.

Tað sigur Dorthe Gyldenkærne, sum hjálpir fyritøkum at fáa tað skilabesta burturúr arbeiðsmegini hjá fyritøkuni, samstundis sum starvsfólkini skulu trívast væl í fyritøkuni.

-Gongur tað illa, síggja vit ofta, at fólk verða uppsøgd, men ein umskipan í fyritøkuni er ofta skilabesta loysnin, sigur hon og leggur afturat:

-Tað finnast sjálvsagt støður, har tað er neyðugt at siga fólki úr starvi, men nógvar støður kunnu loysast við at finna røttu hillina hjá viðkomandi og er hillin at finna innanhýsis í fyritøkuni, vinna báðir partar.

### SETA NÝGGJ FÓLK

Fyritøkan Ad Astra hjá Dorthe Gyldenkærne kann umframt at hjálpa við at finna røttu hillarnar til verandi starvsfólk, eisini hjálpa fyritøkum, sum vilja hava tey røttu nýggju fólkini.

-Kanningar hjá okkum vísa, at ein starvsfólkasetan, sum byggir á eina umsókn og eina samrøðu, hevur 16 prosent kjans fyri at raka rætt, sigur Dorthe Gyldenkærne og vísir á, at Profiles International, sum hon umboðar í Føroyum, arbeiðir við fimm stigum afturat, tá talan er um starvsetanir.

Við eisini at kanna fortíðina hjá viðkomandi, veksur kjansurin fyri at fáa júst tað rætta starvsfólkið upp í 26 prosent. Verður persónligheit og framburður eisini havdur í huga, er 38 prosent kjansur fyri eydnu, mental evnir afturat geva 54 prosent kjans fyri at talan er um rætta fólkið, og verða áhugamál og tileggjan (motivation) tikin við, er 66 prosent kjansur fyri eydnu. Við serligum arbeiðstólum, sum fyritøkan hjá Dorthe Gyldenkærne brúkar, kann prosentkjansurin økjast heilt upp í 75. Tá skal eitt sonevnt "job-match" til. Hetta er ein stór kanning, sum mill-um annað tekur støði í 300 skrivligum spurningum.